ítróttur
Nr. 144 • týsdagur • 5. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# HB tykist eiga slættastu gøtuna

**Nógv talar fyri, at mótbrekkan hjá teimum, sum í síðsta triðinginum av kappingini fara at renna aftaná oddaliðnum, verður sera brøtt**

11. UMFAR SAMANUM
*Jóannes Hansen*


*Rómurin var øgiligur, tá HB í fjør ognaði sær gullið. Enn er langt eftir á mál, men tað tykist kunna benda tann vegin, at HB skal gerast fyrsti meistarin síðani GÍ í 1993-1996, sum megnar at endurvinna meistaraheitið*

Næsta sunnudag verður bara ein triðingur eftir at hesum kappingarárinum. Enn er tíðin ikki komin at spenna trygdarbeltini fyri at tryggja sær mjúka lending, men við støðutalvuni eftir ellivu umfør sum veruleika og skránni hjá einstøku liðunum sum grundarlag er tað ikki heilt á berum at filosofera yvir, hvussu tað man fara at laga seg næstu vikurnar.

Kappingin um at sleppa undan beinleiðis niðurflytingini gerst alt minni. Skála tapti sunnudagin fyri tíggjundu ferð í hesum kappingarárinum, og liðini, sum teir skulu vinna seg framum, um teir skulu sleppa undan sessinum, sum teir hava hildið heitan í so nógv umfør, fóru uppaftur longri frá teimum. Við sigrinum á KÍ slapp VB av næstaftasta plássinum. FSV megnaði javnleik í Gøtu, men teir duttu niður aftur á næstaftasta plássið, sum teir – heldur enn nakar annar – ikki tíma at vera á.

Hýrurin á skálamonnum tykist ikki vera so ringur, men nú sansar av álvara at. Næsta sunnudag fara teir fyri fyrstu ferð at spæla á nýggja undirlagnum á Skála, og tað verður ikki eiti á uppgáva, sum verður á skránni. Gestirnir vera teir í oddaliðnum HB. Samstundis sum Skála fer at stríðast við HB, fara FS Vágar og VB at spæla í Miðvági. Um Skála tapir, so verður munurin undir øllum umstøðum uppaftur størri hjá Skála upp til áttanda plássið, enn hann er eftir ellivu umfør.

## Ongamanna landið

Fyri EB/Streym var tað sjálvandi framúr hugaligt, at teir fyri aðru ferð í ár megnaðu at vinna 3–1 ímóti B36. EB/Streymur er framvegis á sætta plássinum, sum er hægri, enn teir nakrantíð áður hava verið. Men tað eru møguleikar fyri, at teir kunnu røkka upp aftur hægri. Sunnudagin skulu teir til Klaksvíkar, har teir áður hava staðið seg væl. EB/Streymur tykist hava einstaklingarnar, sum megna at fáa nógv burturúr, tá ið teir verða sendir í skjót mótálop. Lítil ivi tykist vera um, at EB/Streymur fer at røkka bestu endastøðuni nakrantíð, men teir fara ikki at stríðast um heiðurskrónurnar og harvið altjóða luttøku.

KÍ tapti í Vági. Úrslitið er staðfesting av tí, sum hevur verið at sæð mesta partin av árinum. Avrikini eru misjøvn, og úrtøkan er ikki til meiri enn plasering mitt í talvuni. Tað kann ikki roknast við endastøðu millum tey bestu, tá ið bara eitt stig fæst burturúr ímóti VB, sum higartil hevur stríðst fyri at sleppa undan niðurflytingini. Klaksvíkingar kunnu framvegis skava eitt sindur saman av stigum, men teir fara ikki at røkka heiðursmerkjum.

Í summarsteðginum vónaðu gøtumenn, at teir kundu vaska talvuna heilt blanka, og at teir so at siga skuldu byrja av nýggjum. Men teir hava framvegis lyklaspælarar á skaðalistanum, og úrslitini í steypafinaluni og á heimavølli ímóti FS Vágum hava verið vónbrot. Teir eru tólv stig aftanfyri oddaliðið, og harvið sær tað heilt svart út fyri, at GÍ enn eina ferð skal sleppa upp í part í altjóða kappingunum.

## Trio vorðin til kvartett í toppinum

B36, HB og NSÍ vóru í summarsteðginum trioin, sum tað varð roknað við skuldi kappast um atgongumerkini til altjóða fótbólt næsta ár. Hesi trý feløgini eru framvegis øll við í hesi kappingini, men støðutalvan boðar frá, at B68, sum í ellivu dystum bara hevur latið sjey mál fara ígjøgnum, eisini er kandidatur til altjóða fótbólt. Í løtuni eru teir á bronsuplássinum, meðan NSÍ – í hvussu so er í hesi vikuni – má smyrja seg við fjórða plássinum.

Tað eru framvegis møguleikar fyri, at tað, sum nú vendir upp, kann venda niður, tá ið øll liðini hava spælt sjey ferðir afturat. Men kortini er tað soleiðis, at tað skal alt meiri til, sum umfar fer at detta av umfari, at troðka seg uppaftur í spíssin. HB er tvey stig frammanfyri B36. B36 má roknast sum favorittur á heimavølli ímóti B68 næsta sunnudag, men HB má roknast sum størri favorittur, tá ið nummar eitt sunnudagin fer at spæla á Skála ímóti nummar tíggju. Um HB vinnur, og um B36 ikki vinnur, so verður munurin næstan órógvandi stórur, um spenningurin er metingargrundarlagið.

HB, sum ímóti NSÍ vann 1–0 fyri fyrstu ferð síðani 16. september í 2001, tá ið teir í sekstanda umfarinum vunnu á heimavølli ímóti EB/Streymi – tykist eisini eiga lættari uppgávur á, enn hini oddaliðini eiga. HB og NSÍ hava spælt tvær ferðir, og HB skal spæla ímóti B36 og B68 í Gundadali. B36 eigur umframt heimadystir ímóti HB og B68 í Gundadali NSÍ í Runavík. B68 skal spæla ímóti NSÍ á heimavølli og báðum havnarfeløgunum á útivølli, og NSÍ eigur B36 á heimavølli og B68 á útivølli.

Umframt hesar lykladystirnar kunnu aðrir sjálvandi fara at vísa seg týdningarmiklir fyri endastøðuna. HB eigur tríggjar dystir á uttanfyri Havnina. Teir eru á Skála (nú sunnudagin) og í Gøtu (annan sunnudag), har teir mugu roknast sum favorittar, og so á Eiði, har teir onkra ferðina áður ikki hava fingið fult. B36 skal til Klaksvíkar, har KÍ ivaleyst í hvussu so er fer at gera eina roynd at vísa at vaska ússaligu úrslitini ímóti B36 burtur, og B36 skal til Gøtu. B68 skal til Vágs, har tað er torført hjá øllum at vinna, og NSÍ skal bæði til Vágs og Klaksvíkar.





# FSF vil hava Henrik at halda fram

**Í løtuni er Fótbóltssambandið í samráðingum við landsliðsvenjaran um møguliga leingjan av samstarvinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*


*Henrik Larsen og FSF eru í løtuni í ferð við at samráðast um, hvørt talan skal vera um leingjan av samstarvinum*

Inniverandi undankappingin hjá føroyska fótbóltslandsliðnum er nú um at nærkast endanum. Hetta merkir samstundis, at sáttmálin, sum FSF og Henrik Larsen hava havt, nú er um at renna út, og tí er spurningurin, hvørt talan skal vera um framhald við samstarvinum.

## Samráðast

Tað eydnaðist okkum ikki mánadagin at fáa orðið á Jens Erik Magnussen, sum er formaður í landsliðsnevndini hjá FSF, men Ísak Mikladal, aðalskrivari, váttar fyri Sosialinum, at Fótbóltssambandið í løtuni er í samráðingum við Henrik.

Hetta fær illa merkt annað enn, at tað er eitt føroyskt ynski um, at Henrik Larsen í øllum førum tvey ár afturat verður føroyskur landsliðsvenjari.

Og tað man lítið vera at ivast í, at stórur partur av fótbóltshugaðu Føroyum eisini hevur ynski um, at Stóri verður verandi her eina tíð afturat. Byrjan hansara í sessinum var kanska av tí heldur tyngra slagnum, og orðini um setanina vóru nógv. Eisini á hesum síðum varð funnist at, at tað gekk ov long tíð, áðrenn hann kom til Føroya at síggja nakran dyst, eins og tað eisini varð mett sum dekan ov nasadjarvt, at hann skuldi boða frá, at nú skuldu Føroyar hava í minsta lagi sjey stig.

## Framburður

Tey sjey stigini, koma Føroyar so neyvan at fáa, hóast tað enn resta nakrir dystir at spæla í undankappingini. Hinvegin er einki at ivast í, at Føroyar ongan tíð hava verið so nær við so nógvum stigum í nakrari undankapping, sum vit hava verið hesaferð. Móti Skotlandi var tað bert ein bøkkur á Svangaskarði, sum oyðilegði føroyska møguleikan at skjóta seg upp á 3-0. Í Týsklandi var Hjalgrím Elttør bert sentimetrar frá at javna til 2-2 í seinastu løtuni av dystinum, og bæði á Laugardalsvøllinum móti Íslandi og á Tórsvølli móti Týsklandi, var tað ikki fyrr enn í evstu løtu, at mótstøðuliðini skoraðu sigursmál síni.

Hetta eru í øllum førum úrslit, sum boða frá føroyskum framburði, og tá venjari so eisini tykist hava funnið seg væl til sættis í føroysku mentanini, er tað tí helst væl skiljandi, at føroysku fótbóltsbossarnir vilja leingja samstarvið.

Hvussu tað higartil hevur gingist við samráðingum, vil Ísak Mikladal ikki siga nakað sum helst um, men føroyska landsliðið fer í næstum undir tær tríggjar seinastu uppgávurnar, og einki er at ivast í, at bæði FSF, leikararnir og Henrik Larsen sjálvur fegnir høvdu vilja sæð eina avklárin á málinum, soleiðis at hetta ikki kann koma at órógva fyrireikingarnar.


Hevur tú lætt flog?

Runavíkar Kommuna sóknast eftir
Arbeiðsformanni til veg- og kloakkdeildina.

**Arbeiðsformaðurin:** kemur í høvuðsheitum, undir leiðslu av teknisku deild, at standa fyri umvælingar- og viðlíkahaldsarbeiðinum í samband við vegir og kloakkir o.a í Runavíkar Kommunu.

**Lønarviðurskifti:** sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Persónligir eginleikar:** umsøkjarin, sum skal vera í góðum árum, skal hava handverkara útbúgving og/ella royndir í samband við veg- og kloakkarbeiði, kunna arbeiða sjálvstøðugt, kunna taka skjótar og rættar avgerðir, vera fyrikomandi og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

**Meira fæst at vita** um starvið við at seta seg í samband við Jógvan D. Jakobsen, býarverkfrøðing, á telefon 417000.

**Umsókn:** saman við viðmælum og neyðugum upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Runavíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 8. august 2003.
Viðmerkjast skal á brævbjálvan "Arbeiðsformaður".

Runavíkar kommuna
Heiðavegur 26 • FO 600 Saltangará • Tel 417 000 • Fax 417 001 • runavik@runavik.fo • www.runavik.fo


Tilboðsferðir
frá Atlantic Airways



Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar

1.795,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 29/9 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 7/8 til 6/10 2003

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferð skal verða hósdag, fríggjadag ella leygardag. Heimferð skal verða sunnudag ella mánadag.

Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

2.095,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 1/10 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 7/8 til 8/10 2003

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.



Vikuskiftisferð til Billund

1.795,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Vel ímillum vikuskiftini 07/8 - 12/8 2003 ella 14/8 - 19/8 2003.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Serlig APEX-ferð til Billund

2.095,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 22/9 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 7/8 til 29/9 2003

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.

SANSIR 355 355

Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo